SANDAVÁGS
KOMMUNA

07-05-2002

Føroya Fornminnisavn
J. nr. 8310-K003

# Viðtøkur

# fyri

# Sandavágs Bygdarsavn

## *Navn, heimstaður og endamál*

1.

Navn savnsins er Sandavágs Bygdarsavn. Heimstaður savnsins er Sandavágur.

2.

Sandavágs Bygdarsavn sett á stovn av Sandavágs Bygdaráð og Sandavágs Fornminnafelag. Endamál savnsins er, við serligum atliti at Sandavágs bygd, søgu og fólki:

1. at savna, skráseta og varðveita alt slag av søguligum tilfari, so sum fornminnisligum lutum og lutum frá nýggjari tíð, skjøl, myndir, listaverk, band- og sjónbandaupptøkur o.s.fr., sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan til ymsar tíðir ella eru knýttar til søguligar hendingar.

2. at virka sum upplýsingarstovur við at skipa fyri framsýningum, fyrilestrum og líknandi tiltøkum á øllum viðkomandi økjum.

3. at varðveita og umsita føst fornminni, m.a. Løgmannagarðin, Tvíhúsini á Steig, Hjallarnir á Steig, Pakkhúsið úti á Bakka, (Bartalstovuhandilin), fiskastykkini, kjøthjallin hjá Løgmanni, v.m.

4. í øllum virki savnsins, at vekja ans fyri fornminnum, søguligum bygningum, umhvørvum og forngripum av antikvariskum, siðsøguligum og estetiskum virði og beinleiðis arbeiða fyri varðveiting av slíkum (Eingjartoftir, grevsturin í Hagagerði v.m.)

## *Leiðsla*

3.

Felagið verður stjórna av eini 5-manna nevnd, har 2 limir verða valdir av Sandavágs Bygdaráð og 3 limir í Sandavágs Fornminnafelag. Stýrið skipar seg við formanni, næstformanni og kassameistara, um ongin savnsleiðari er settur. Formaðurin kallar inn til og stjórnar nevndarfundum. Formaður savnsins skrivar í gerðabók frágreiðing um mál ið eru til viðgerðar og samtyktir á nevndarfundum og annars um virkið felagsins. Gerðabókin skal undirskrivast av hjástøddu nevndarlimunum.

SANDAVÁGS KOMMUNA · FO 360 SANDAVÁGUR · TEL +298 332 470 · FAX +298 333 470
SANDAVAGUR@SANDAVAGUR.FO · WWW.SANDAVAGUR.FO

4.

Nevndin stendur aðalfundi, Sandavágs bygdaráð og Sandavágs Fornminnafelag til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

5.

Um 2 nevndarlimir krevja tað, skal formaðurin kalla inn til nevndarfund.

6.

Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu. Nevndin er viðtøkufør tá 3 limir eru á fundi. Atkvøðugreiðsla verður avgjørd við vanligum meiriluta millum møttu nevndarlimirnar. Standa atkvøður á jøvnum, er málið burturdottið á hesum fundi.

7.

Nevndin kann seta savnsleiðara, sum við hjálp og leiðbeining frá landsantikvarinum og undir eftirliti hansara tekur sær av dagligu viðurskiftum felagsins.

## *Roknskapur og grannskoðan*

8.

Roknskaparárið er frá 1. januar til 31. desember. Fyrsta roknskaparárið gongur frá stovningardegnum til 31. desember.

9.

Savnsleiðari ella kassameistari nevndarinnar heldur roknskapin soleiðis, at tað altíð ber til at síggja, hvussu fíggjarstøðan er. Roknskapurin skal gerast liðugur í so góðari tíð frammanundan ársaðalfundi hjá Sandavágs Fornminnafelag, at formaðurin kann lata Sandavágs bygdaráð, grannskoðararnir og nevndarlimirnar fáa roknskapin til kanningar.

10.

Grannskoðaður roknskapur verður fyrilagdur á ársaðalfundi hjá Sandavágs Fornminnafelag og á fundi hjá Sandavágs bygdaráð til góðkenningar, og verður sendur landsantikvarinum, við frágreiðing og skjølum seinast 2 mánaðir eftir aðalfundin. Samstundis sendir savnsleiðarin ella kassameistarin eina av nevndini góðkenda rakstraræltan fyri komandi fíggjarár

SANDAVÁGS KOMMUNA · FO 360 SANDAVÁGUR · TEL +298 332 470 · FAX +298 333 470
SANDAVAGUR@SANDAVAGUR.FO · WWW.SANDAVAGUR.FO

**SANDAVÁGS KOMMUNA**

07-05-2002

# *Avtøka av savninum*

11.

Avtøka av savninum krevur samtykt á tveimum lógliga lýstum bygdaráðsfundum hjá Sandavágs Kommunu og tveimum aðalfundum í Sandavágs Fornminnafelag upp í slag. Verður avgjørt, at gevast við savninum, verður farið fram eftir grein 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 av 09. mai 1972 við seinni broytingum.

Soleiðis samtykt á eykaaðalfundi Sandavágs Fornminnafelags í Sandavági tann 26.04.2005.,

og á bygdaráðsfundi hjá Sandavágs kommunu tann 01.06.2005

Avrit at vitøkunum er viðlagt

Sandavágur tann 26.04.2006

Nevndin skipar seg soleiðis:

Olevina Thomassen, formaður

Tórleif Simonsen, næstformaður

Dánjal Thomsen, kassameistari

Regin á Lofti, nevndarlimur

Jógvan Olsen, nevndarlimur

SANDAVÁGS KOMMUNA · FO 360 SANDAVÁGUR · TEL +298 332 470 · FAX +298 333 470
SANDAVAGUR@SANDAVAGUR.FO · WWW.SANDAVAGUR.FO